## Eitt sindur um Hoyvíksgarð

*Hoyvíksgarður varð onkuntíð í miðøld skiftur sundur í tveir garðar. Um ár 1600 vóru teir aftur lagdir saman til eitt festi, sum tlsamans taldi 18 merkur innangarðs*

Fyrst í 1800 árunum varð festið aftur sundurbýtt. Bóndin varð tá sitandi við hálvum garðinum, meðan fúti og sorinskrivari yvirtóku hina helvtina. Í sambandi við hetta festibýtið vórðu sethúsini Niðri í Stovu, núverandi Hoyvíksgarður, bygd. Fútin fekk gomlu sethúsini, Uppi í Stovu.

Hagin var tilsamans 12 merkur og bar 440 áseyðir. Seinni vórðu eisini fleiri traðir innlagdar og nýttar sum sjálvstøðug brúk. Trøðin Uttan fyri Garðar, varð innløgd umleið 1830, Hvítanes í 1838 og Úti á Tanga, sunnan fyri Sundsá, í 1867.

Um 1810, tá ið garðurin varð býttur í tvey festi, hevði bóndin 308 áseyðir, sjey mjólkikýr, eitt fýramannafar og eitt áttamannafar. Uppsitarin hjá fútanum hevði 180 seyðir, fimm mjólkikýr og eitt fýramannafar. Um hetta mundið vóru 10 fólk í húsi hjá bóndanum, og seks fólk hjá uppsitaranum.

Í sambandi við velting hjá Royndarstøðini frá 1936 til 1954 eru funnar bústaðarleivdir í Kúrdali, sum vísa á eldri búseting. Søgnin sigur, at bóndin, ið festi í 1722, flutti húsini haðani til Heima á Garði, har sethúsini nú eru.

Í 1921 yvirtók Royndarstøðin Fútans Garð. Orsakað av nýbygninginum hjá Royndarstøðini blivu húsini Uppi í Stovu niðurtikin. Tilfarið varð m. a. endurnýtt til hoyggjhúsið á Sortugrasastykkinum go til eitt úthús á Hvítanesi.

Framsýningin á Hoyvíksgarði er sera áhugaverd - serliga fyri føroyingar at síggja, hvussu forfedrar okkara livdu fyri áttati árum síðani. Fram-sýning er sera væl egnað til skúlaflokkar o. l.



*Fýra av teimum, sum hava luttikið í verkætlanini: Mayfinn Norðoy, arkitektur, Osva Olsen, fólkalívsfrøðingur og savnsvørður, Marita Weihe, arkitektur og Símun V. Arge, landsantikvarur*
**Mynd: Jens Kristian Vang**

# Hoyvíksgarður aftur í 20'ini

*200 ára gamli Hoyvíksgarður er nú settur í stand og er latin upp sum savn, ið skal ímynda eini føroysk bóndahús frá 1920 árunum*

EIRIKUR LINDENSKOV

Niðarliga í Hoyvíkini stendur gamli Hoyvíksgarður, nýbræddur við finskari tjøru. Fornminnissavnið hevur boðið til tíðindafund í góðveðrinum - og verður fundurin hildin í roykstovuni aftur við kaffi og smákøkum frá 20'unum.

Komin inn í roykstovuni eru vit farin 80 ár aftur í tíðina, tí gamli bóndagarðurin stendur nú, sum ein slíkur garður gjørdi í 1920'-unum.

Hesin garður, sum er bygdur umleið 1810, skal verða karmur um útisavnið í Hoyvík, sum lat upp leygardagin.

Arbeiðið við at endurskapa Hoyvíksgarð byrjaði í 1993, og hevur verið arbeitt so hvørt, sum pengarnir hava verið til taks.

Alt arbeiðið er gjørt frá grundini - og á sama hátt, sum tað var gjørt í teirri tíðini. Og sum vera man, tá talan er um restaurering, so verður sum mest varðveitt av tí gamla tilfarinum. Um onkur syll hevur verið rotin ella fýretin í støðum, so er bert tann parturin skiftur út, og nýtt tilfar lúsað íaftur, eins og einstakar fjalar eru skiftar, um tað hevur verið neyðugt.

Munurin á restaurering og at gera av nýggjum er, at bert tann parturin av tilfarinum, sum er so vánaligur, at hann ikki kann brúkast, verður skiftur.

Stórur dentur er lagdur á, at sum minst skal síggjast av tí nýggja, og als ikki nýtímans hentleikar so sum elinnleggingar og miðstøðuhiti. Hitin er lagdur undir gólvið, so húsini verða upphitað uttan at farvegurin av rørum ella radiatorum er at síggja.

– Vit hava gjørt alt frá grundini. Øll arbeiðsgongdin er skrásett, so tað ber altíð til at venda aftur til onnur tíðarskeið, um tað einaferð verður ynskiligt, sigur Símun V. Arge, settur landsantikvarur.

Tey á Fornminnissavninum hava lagt stóran dent á at fáa húsið at síggja út innan, sum tað gjørdi í 20'unum. Har máling er nýtt, er málað við gamlari linoljumáling. Út frá gamla tapetinum, tey hava funnið í húsinum, er nýtt tapet prentað á serligum virki í Noreg. Nógv er gjørt burtur úr at finna lutir og búnyttur, sum brúktar vóru tá, og Osva Olsen, fólkalívsfrøðingur, sum er savnsvørður á Fornminnissavninum sigur, at fólk hava verið sera beinasom at lænt og givið teimum slíkar lutir - eisini lutir, sum hava hoyrt til húsið.

Umframt sjálvan bóndagarðin, so umfatar ætlanin eisini øll úthúsini, sum hoyra til garðin. Nøkur eru sett í stand og onnur verða sett í stand seinni. Símun V. Arge sigur, at tey eisini hava endurreist úthús, sum hava ligið sum toftir í mannaminni.

Hóast fleiri av úthúsunum hava verið niðurdottin langt fyri 1920, og tískil verða sett í stand til eitt eldri tíðarskeið, so verður hetta kortini gjørt fyri at vísa funktiónirnar, tey høvdu.

Men hví 1920, kunnu vit spyrja.

– Mourits Mohr, bóndi tók við festinum í 1912, og gamli bóndin, Poul Mohr, doyði í 1920, og gólv varð lagt á í roykstovuni umleið ár 1920, sigur Osva Olsen.

Hon sigur eisini, at vit í Føroyum eiga fleiri aðrar bóndagarðar, sum lýsa eldru tíðina.

Framsýningin er opin mán. til fr. frá klokkan 10-17 og í vikuskiftinum frá kl 14-17. Kostnaðurin er 30 krónur, men børn og skúlaflokkar hava ókeypis atgongd.



*Stórur dentur er lagdur á at fáa til vega íløt o. a. frá 20'unum*
**Mynd: Jens Kristian Vang**



*Bóndans stova í 20'unum...*
**Mynd: Jens Kristian Vang**



# Jesus og Makedónarin í nýggjum hami

*KONSERT. Annan hvítusunnudag frumframførir Føroya Symfoniorkestur nýggju útleggingina av tónlistaverkinum Jesusi og Makedónaranum hjá Paula í Sandágerði og Sigmundi Poulsen*



*– Operasangararnir vera í vanligum konsertbúnum og tað verður onki »rennarí« á pallinum, sigur tónasmiðjurin, Pauli í Sandágerði*

HØGNI MOHR

Fleiri virdir føroyingar og útlendingar leggja røddir til, tá ið Føroya Symfoniorkestur og solistar fara á pall í Norðurlandahúsinum at framføra tónleikamyndina, Jesus og Makedónaran, 12. juni kl. 17.00.

Millum teirra, ið fara á pall at lata sangin ljóma, eru okkara egnu Rúni Brattaberg (presturin, Annas), Ernst Dalsgarð (Jesus), Berghild Poulsen (Maria Magdalena) og Ólavur Jøkladal (Pilatus). Tey verða væl stuðlað av íslendska gestasangaranum, Ólafi Kjartani Sigurðarsyni (Makedónarin), svenska Peturi Bohman (Judas) og donsku/føroysku Randi Madsen (skøkja).

**Óbroyttur tekstur**

Jesus og Makedónarin vórðu framførdir á fyrsta sinni 25. mei í 1984. Men upprunaútgávan av verkinum var ein blanding av rokki, klassiskum tónleiki og sjónleiki.

Framførslan 2. hvítusunnudag er broytt munandi. Teksturin er hin sami, men verkið er nú skrivað fyri symfoniorkestur og verður framført sum konsert ella oratorium. Operasangararnir vera í vanligum konsertbúnum og tað verður onki »rennarí« á pallinum, sum Pauli í Sandágerði, tónasmiður, tekur til

Men kortini verður dialogur millum luttakararnar, ið hava sínar serskildu leiklutir.

**Altjóða snið**

Pauli í Sandagerði, ið hevur gjørt allan tónleikin í verkinum, hevur áður umskrivað verkið um Jesus og makedónaran. Tað var í sambandi við framførslu í Skotlandi fyrst í nítiárunum. Hesa ferð hevði Føroya Symfoniorkestur tørv á einum verki til 1.000 ára haldið fyri kristningina í Føroyum. Úrslitið er, at Jesus og Makedónarin sum tónleikaverk hevur fingið altjóða snið. Nú kann ein og hvør orkesturleiðari taka verkið í nýtslu uttan stórvegis hóvasták.

Tónasmiðurin er vísur í, at verkið, sum nú verður framført í Norðurlandahúsinum, er liðugt.



## Einfaldi boðskapurin

HØGNI MOHR

Søgan um Jesus og makedónaran fer í høvuðsheitum fram á seinastu døgum Jesusar. Ein grikskur sjómaður (makedónarin) fer í brúdleyp hjá bróðuri sínum í Kána. Har hittir hann Jesus, sum hann heldur vera ein stuttligan jass, tí Hann dugir at gera vatn til vín.

Makedónarin kennir lítið til átrúnað og trúgv, men hann verður áhugaður í manninum, Jesusi og fer aftaná lærusveinum hansara. So við og við vísir tað seg, at makedónarin, og kvinnurnar skilja Jesus og boðskap hansara nógv betur enn hinir skriftlærdu jødarnir.

Ein moralur í søguni um sambandið millum Jesus og makedónaran er, at hin einfaldi boðskapurin um t.d. næstrakærleika kann hvørva í hurlivasanum av torskildum skriftstøðum.

# Fragd at syngja inn

*Malan Eyðunsdóttir gevur í dag út nýggja fløgu . -Tað er serliga tey framúr góðu løgini sum hava gjørt fløguna til eina fragd at syngja inn sigur Malan*

- Hvørt einasta av teimum 11 løgunum á fløguni er nakað heilt serligt. Ikki eitt einasta av teimum er eftir mínum tykki eitt veikt lag sigur Malan um fløguna, sum í dag verður at fáa í fløguhandlunum

Malan smæðist ikki við at kalla nýggju fløguna eina reindyrkaða poppfløgu. - Føroyskur poppur til føroyska fólkið!

Á fløguni, sum hevur fingið stutta heitið Malan, eru bæði still og innilg løg, og eisini meira lívlig løg. Serliga spenta sigur Malan seg vera uppá móttøkuna av einum latino lagi. Malan heldur sjálv, at hon er sera heppin, at vera sloppin at gera eina fløgu, har tónleikurin er skræddaraseymaður til hennara rødd.

Tónleikurin á fløguni er skrivaður av Kára Jacobsen. Kári er maðurin aftan fyri



fleiri føroyskar landaplágur, eitt nú Tann deiliga Havn og Stórasystur og lítlibeiggi. Eisini útlendingar hava havt gleði av tónlistarligu gávunum hjá Kára Jacobsen, seinast var tað Grace Jones.

Hóast sín unga aldur, er Malan ein av mest royndu føroysku songkvinnunum. Longu heilt lítil fór hon undir at syngja, og hetta hevur bara vundið uppá seg. Malan verður av teimum flestu sett í samband við Mark No Limits, tað var saman við hesum bólkinum at tað eydnaðist henni at vinna Prix Føroyar kappingina

Tað hevur tikið Maluni umleið tvey ár at gera hesa fløguna, sum fyri tað mesta er innspæld í Keypmannahavn. Tað er 3'arin sum gevur Maluna út.

